Starvsfólk til avgreiðslu

Søkt verður eftir starvsfólki til avgreiðslu-na hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

Arbeiðið umfatar
- sølu og avgreiðslu av flogferðaseðlum
- avgreiðslu av ferðafólkum flogførum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur FHS ella HH-prógv, og annars rokna vit við, at hann
- hevur kunnleika til at arbeiða við teldu
- hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug til at arbeiða skiftandi tíðir

Umsókn
Skrivlig umsókn skal í seinasta lagi 20. august 2001 sendast til Atlantic Airways, har eisini nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið á tlf. 341036 Egin Simonsen.

ATLANTIC AIRWAYS

380 Sørvágur
Tlf. 341000
Fax 341001

Starvsfólk

søkist til Café Natúr at byrja 01. september.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

Café Natúr
Postboks 145
110 Tórshavn

í seinasta lagi 11. august.

Ger kvettið!

Vegna flyting selist 11 mør. gamal Nissan Almera 2,0 turbo diesel.

Vegleiðing til fígging fæst.

Tlf. 444450 og 253448

Summarfrí

Vit eru í summarfrí frá 30. juli til 20. august.

Sp/f Petur Hammer,
Tvøroyri

Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

Upplæringin umfatar
- sølu og avgreiðslu av ferðaseðlum
- avgreiðslu av ferðafólkum og flogførum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur FHS ella HH-prógv, og annars rokna vit við, at hann
- hevur kunnleika til at arbeiða við teldu
- hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug til at arbeiða skiftandi tíðir

Umsókn
Skrivlig umsókn skal í seinasta lagi 20. august 2001 sendast til Atlantic Airways, har eisini nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið á tlf. 341036 Egin Simonsen.

ATLANTIC AIRWAYS

380 Sørvágur
Tlf. 341000
Fax 341001

Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir tveimum pedagogum.
Eitt starv er 32 tímar um vikuna og eitt er 30 tímar um vikuna í eitt farloyvisstarv fyribils til 01.12.2001. Møguleiki er fyri annað starv eftir hetta.

Í vøggustovuni eru 3 stovur við 11 børnum á hvørjari.

Vit bjóða tvey áhugaverd størv, har umsøkjarin fær møguleika til at gera sína ávirkan á stovnin.

Vit ynskja at umsøkjarin:
- hevur góð samstarvsevni.
- er røkin, nærlagdur og álítandi.
- er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið.
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri einstaka barninum.

Størvini verða sett 1. sept. 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir á telefon 313131.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi seinast 20. august 2001.

Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

Hjálparfólk

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til fysiurgisku deild frá 1. september 2001.

Talan er um eitt starv við fullari arbeiðstíð.

Starvið er fjølbroytt og arbeiðsuppgávurnar ymiskar. M.a. innkalling av sjúklingum, luttøka í venjingum av sjúklingum, eisini í heitum hyli og praktiskt viðlíkahald í dagligdegnum.

Umsøkjarar skulu hava lokið prógv sum sjúkrahjálpari, heilsuatstøðingur ella líknandi.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðandi fysioterapeut John Rødgaard, tlf. 371133, lokal 115.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
Att. Umsjónarmaðurin
800 Tvøroyri

áðrenn 20. august 2001.

Skrivstovufólk

Á Dómaraskrivstovuni verður søkt eftir fólki við hollari skrivstovuútbúgving til setan tann 1. september 2001.

Talan er um eitt starv við niðursettari arbeiðstíð – 30 tímar um vikuna.

Viðkomandi verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, ella Niels Tang Christensen, rættarassessor, tlf. 311003.

Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 17. august 2001.

Sorinskrivarin í Føroyum,
tann 27. juli 2001

Niels Tang Christensen
ra.

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

ADC

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði,ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

NISSAN BLUEBIRD 1.8
Turbo, árg. 86, 190.000 km., svartur, 17" sportsfelgur, senkaður, rustfríður, í góðum standi, næstan allir slit deilir skiftir. Tveir turbo eyka bilar uttan plátur kunna fylgja við. Báðir koyra. Eisini kann eitt stórt anlegg fylgja við.
Tlf. 221067

TIL SØLU
HONDA CIVIC 1.5 i LS VTEC SEDAN, árg. sept. 99, 114 HK, koyrt 26.000 km, el-rútar aftan og framman, el-spegl, radio við cd-spælara, 15" sportfelgur + 14" stálfelgur við heilársdekkum. Sera væl hildin. Er metall grønur.
Tlf. 441944 - 256138

CITROEN BX
Árg. 87, uttan plátur til sølu. Bilurin krevur smávegis ábøtur, er annars í góðum standi.
Tlf. 422426

FORD ESCORT 1,3
Stationcar, árg. 87 til sølu. Koyrur, men krevur ábøtur. Nýggjur skermur og ein lykt fylgja við.
Tlf. 255754

CHERVOLET MONZA
Árg. 88 biliga til sølu.
Tlf. 281176

EYKALUTIR
Eykalutir til Toyota Haice, árg. 87, til sølu. Góður motorur 120.000 km., bakrút, dragihurð, rút, baklúku, gearkass, stýri snekja og annað gott.
Tlf. 210560 - 423572

TIL SØLU
Gear til W transportara 4 trins.
Tlf. 210560 - 423572

DEILIR TIL SØLU
Deilir til Honda Civic 1,5 i (5 hurðaður). Komplettur motorur við gearkassa, hevur bert koyrt 2.000 km. Hurðar og inntrek. Verður selt biliga.
Tlf. 217406

NISSAN PATROL
Árg. 88, uttan plátur, til sølu møguligani sum deilir.
Tlf. 223111

KRÓKUR
Hevur nakar ein krók til Opel astra at selja mær?
Tlf. 371546

NISSAN SUNNY 1.6 SGX
Árg. 86, er í góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr. Sýnaður í feb.
Tlf. 224980

TOYOTA CARINA II 2,0 GLI
Árg. 89, hatchback, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 317785

HONDA ACCORD 2,0 EX
Árg. 86. Spoylarar framman, vel, sportfelgur, sleipikrók. Hevur koyrt 250.000 km., er í sera góðum standi.
Tlf. 211235

BMW 316
Ein silvurgráur BMW 316, árg. 96 hevur einans koyrt 80.000 km. Er sum nýggjur. Kom og royn hann. Prísur 145.000 kr.
Tlf. 224668

NISSAN KING CAB
Árg. 89 til sølu. Er nýsýnaður.
Tlf. 361364

FORD ESCORT
til sølu. Árg. 4.96
Tlf. 226019

OPEL ASCONA 1.6
Árg. 84 til sølu. Koyrir væl. Hevur fingið nakrar krossar, men kann gerast. Til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 219280

NISSAN URVAN
Árg. 86, diesel til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 441130 - 442017

MERZEDES BENZ 300 D
Diesel, til salg på grund af flytning. 9.000 kr.
Tlf. 424794

16" SPORTFELGUR
1 ára gamlar sportfelgur við 4 holum til m.a. BMW og Opel Vectra til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 227007

2 TOYOTA HIACE
til sølu sum eykalutir. Møguleiki er at gera ein aftur. Báðir fáast fyri 4.000 kr.
Tlf. 220744

NISSAN PATROL 3,3
Turbo, árg. 87. Til sølu sum eykalutir ella til at gera aftur. Klárar ikki gjøgnum sýn. Prísur 5.000 kr.
Tlf. 220744

DEILIR TIL TOYOTA CAMRY
Árg 83-86 og 87-91
Tlf. 217192 og 214413

TOYOTA PREVIA
Árg. 96, 8 pers., 61.800 km. til sølu fyri 169.000 kr. vegna flyting.
Tlf. 444849 - +44 7974314744

SPORT RENAULT CLIO
árg. 94 v/ sportfelgum.
Tlf. 223980

BMW 324 TD STATIONCAR
Árg. 87. Motorur v/ kvittan. Koyrt uml. 90.000 km. Er í góðum standi.
Tlf. 223980

MAZDA 626
Árg. 87til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 224757 e. kl. 18

VOLVO AMAZON
ella líknandi ellisakfar ynskist til keyps. Ikki yngri enn árg. 70
Tlf. 224060 e. kl. 17

TOYOTA CARINA II 1,6 GL
Reyður, árg. 89 til sølu
Tlf. 252258

NISSAN PATROL 4,2 DIESEL
Styttra modellið, reyður, árg. 89, koyrt 245.000 km. Hevur setur aftan, skrásettur sum persónvognur. Er nýsýnaður og í góðum standi. Prísur 78.000 kr
216409

Amboð

ELU SAG
Brúkt Elu sag ynskist til keyps.
Tlf. 449088

TIL SØLU
Ein Irus slaimaskina v/ dubultum hjólum og 2 knívum til sølu sum reservadeilir.
Tlf. 422312

BT LYFTIVOGNAR
Brúktir BT lyftivognar verða seldir við avsláttri. Lakeraðir og galvaniseraðir. Frættið nærri. Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

Arbeiði

VASKIARBEIÐIÐ SØKIST
31 ára gomul kvinna søkir vaskiarbeiði.
Tlf. 448990

ARBEIÐI
Søkt verður eftir fólki at mála. Tú skalt vera minimum 18 ár. Málarin Magnus Zachariasen.
Tlf. 253025

TIMBURMAÐUR/ARB.MAÐUR
Søkt verður eftir einum timburmanni ella arbeiðsmanni at byrja skjótast tilber.
Byggivirkið KBH tlf. 448874 - 218874

SØKIST
Ung genta søkist at ansa 2 børnum í Trongisvági, 2 og 4 ára gomul. Skiftandi arbeiðstíðir, tó bert dagarbeiðið. Tú kanst byrja beinanvegin ella eftir feriu hálvan sept.
Tlf. 222694

Barnaútgerð

TIL SØLU
Bláur Brio barnavognur við lyft, tasku og regnslagi til sølu fyri 2.000 kr. Dýna og koddi til sølu fyri 500 kr. Babylurtari til sølu fyri 400 kr. Gangistólur til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 423465

HVÍT TREMMUSONG
við madrassu til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 319213

BARNAVOGNUR
Blágráur brio barnavognur til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 448488

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Grønur Brio koyristólur, væl viðfarin. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 373842

SILVUR CROSS
Silvur Cross barnavognur við kurv, 2 mør. gamal, til sølu fyri 3.700 kr.
Tlf. 313450 - 257214

BILSTÓLUR
til barn uml. 1 ár ynskist til keyps. Helst merkið Britax, men alt hevur áhugað.
Tlf. 310209 - 258172

BARNAVOGNUR TIL SØLU
av merkinum Simo. Myrkabláur við myrkum stelli. Vælhildin. Hevur madrassu og flugunet. Nýprísur 5.000 kr. til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 216395

Bátaútgerð

YNSKIST
Plststýrihús til eitt 6 mannafar úr Kalbak ynskist til keyps.
Tlf. 374210 - 373450

TIL SØLU
1 stk. fiskiloyvi. 1 stk. ardna 61 HK motor til sølu.
Tlf. 372104 e. kl. 19

DIESEL BÁTAMOTORUR
Lister diesel 8,5 HK við aksilgreiðum.
Tlf. 447484

TIL SØLU
Shetland family four 18 ft. v/mariner 60 HK. 28 knob, radio, vask, ekkolodd. Trailari. Til sølu fyri 100.000 kr.
Tlf. 441722 - 211722

MOTORUR
36 HK Bukh motorur við geari til sølu.
Tlf. 441381

Bingo

TVØROYRAR KLUBBI
hevur bingo leygarkvøldið 4. aug. kl. 20
Nevndin

BÁRU-BINGO
Heimabingo fæst til keyps á Posthúsum og sølubúðum kring alt landið. Tú sært beinanvegin, um tú hevur vunnið.
Báran

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Ein ljósagrá taska burturblivin, tá ið Norrøna mikudagin kom til Havnar. Hon er burturblivin inni ella uttanfyri Farstøðina. Í taskuni eru klæðir og parfuma. Vinarliga ring á
tlf. 219200

HÚGVA BURTURMIST
Húgva burturmist á ólavsøku. Hon er heimabundin, ljósareyð og svørt, til gentu uml. 3 ár. Um nakar hevur funnið hana, so vinarliga ring á
tlf. 457785 - 217776

BROSJA BURTURMIST
Ein barna brosja til føroyska búnan er burturmist á teinunum kaiøkið og Jónas Broncks tivoliøkið ólavsøkuaftan.
Tlf. 361644

BELTI BURTURMIST
Belti til føroyska búnan, merkið hestaskógvur, burturmist ólavsøku aftan í miðbýnum. Um nakar hevur funnið tað, so ring vinarliga á
tlf. 313760

FARTELEFON
Eg havi mist burtur eina fartelefon av merkinum Siemens S35. Hon hevur veriðhorvin síðani sunnukvøldið. Hevur tú funnið hana, vinarliga ring
tlf. 444420

SVØRT HÁNDTASKA
burturmist á ólavsøku. Taskan er lítil og blonk. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga ring á
tlf. 224356

BURTURMIST
Eftir sangløtuna (millum kl. 01.00-03.00) ólavsøkukvøld, misti eg brosjuna úr teimum føroysku klæðunum. Hon er stór, oval, úr silvuri við einum føroyskum opali í miðjuni. Brosjan hevur stóran týdning fyri meg, og eg lati fegin 500 kr. í finningarløn.
Tlf. 318464

BURTURMIST Á ÓLAVSØKU
Hvitt broderað silkifyriklæð til føroyskan konufólkabúnan mist ólavsøkuaftan í gongugøtuni. Vinarliga ring 32 11 97, um tú hevur funnið tað ella veitst um tað.
Tlf. 321197

Býli

KAMAR YNSKIST
19 ára gomul genta søkir kamar í Havn. Fari væl um og gjaldi til tiðina.
Tlf. 221236

HJÁLP!!!
Vit eru eitt par fyrst í 20unum, ið leita eftir einari íbúð at leiga ella framleiga í Kbh. Vónandi kanst tú hjálpa okkum. Beinta og Eyðfinn
Tlf. 255306 - 316400

HÚS YNSKIST
Mamma við 3 børnum sóknast eftir einum húsum til leigu í Streymoynni ella Eysturoynni skjótast gjørligt. Tá tað elsta barnið skal byrja í skólanum nú í aug. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjaldað til tiðina.
Tlf. 250084

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð til leigu í Keypmannahavn fram til 12. august.
Tlf. 314155

ÍBÚÐ YNSKIST
Trý íslendsk systkin ynskja ein íbúð. Vít hvørki roykja ella drekka. 99Kristinso@nvd.fo
Tlf. 317065 - 315227

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung kvinna ynskir íbúð í Havn.
Tlf. 332119

FRÍTÍÐARHÚS
Frítíðarhús í Funningsfyrði, við øllum hentleikum til leigu.
Tlf. 441347

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er onkur, ið hevu reina íbúð til leigu í Keypmannahavn frá 27. august til 2. september? Vinarliga ring
Tel 222528

ÍBÚÐ YNSKIST
Trúgvandi friðarlig fólk ynskja íbúð í Havn. Hava fast arbeiðið. Gjalda til tiðina.
Tlf. 316219

ÍBÚÐ ELLA HÚS
ynskjast til leigu í Klaksvík skjótast gjørligt.
Tlf. 457625

FERÐIST Í SANDOYNNI
Gisti á Mýruni í Húsavík. Allir vanligir hentleikar. Sera vakurt útsýni.
Tlf. 318037

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par fyrst í 20-unum, ið leita eftir einari íbúð í Havn frá 1. juni ella skjótast tilber. Vit hava bæði fast arbeiði og roykja ikki. Um tú kanst hjálpa okkum, vinarliga ring
Tlf. 226706

HØLI TIL LEIGU
Kjallarin á Sosialinum er til leigu. Hølini eru slakar 100 fermetrar til víddar, inngongd er til hølini frá parkeringsøkinum niðan fyri húsini, og parkeringsviðurskiftini eru góð. Nærri fæst at vita við at ringja til Sosialin
216409 ella 311820

Dansur

VESTURHØLL Í FÁMJIN
Túnadansur verður leygarkvøldið 4. august, moonshot spælir.
Vesturhøll

DANSINÁTT Í ØRAVÍK
11. aug. skipað dansifeløgini í Suðuroy & Hotel Øravík fyri almennum føroyskum dansi. Borðhald verður áðrenn v/ heitum rættum. Byrjað verður kl. 20. Kostnaður fyri borðhald og dans 150 kr. Tekning áðrenn 9/8 á tlf. 371208 - 371648 - 373353 - 370561 og
á tlf. 371302

Dýr

KETTLINGUR
Ein sera fittur kettlingur fæst við at avheintað hann. Hann er lagdur 1. juli.
Tlf. 312619 - 210090

ÍSLENDSK RYSSA
10 ára gomul íslendsk ryssa, gul á liti, til sølu fyri 16.000 kr.
Tlf. 333571 - 220531

UNDULÁTUR TIL SØLU
Ein sera fittur undulátur til sølu fyri 800 kr. vegna allergi. Búður og tilbehoyr fylgir við.
Tlf. 316212

KETTLINGUR
Eg eri ein sera fittur, kelin frensur, svart/hvítur, sum verður latin djóravini.<
Tlf. 255279

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki